Fíggjarmálaráðharrin um tillagingar á fíggjarlógini:

# - Eykajáttan verður helst neyðug

**Fíggjarnevndin sparir í rakstri umleið 49 milliónir krónur á fíggjarlógini. Seks av hesum milliónunum skulu netto sparast í fíggjarmálaráðnum. Men Bárður Nielsen, fíggjarmálaráðharri, metir ikki, at metingarnar av útreiðslunum til rentustuðul koma at halda.**
**- Tað er alt, ið bendir á at rentan fer at hækka seinna hálvár 2004, men tað er ikki pláss fyri aftaná Fíggjarnevndin hevur skert hesa játtanina við 4 milliónum, sigur Bárður Nielsen**

FÍGGJARLÓG
*Hans Kárason Mikkelsen, hans@sosialurin.fo*

- Vit mugu tillaga okkum tí, sum fíggjarnevndin kemur við. Men vit mugu minnast til, at starvsfólkatalið í fíggjarmálaráðnum er tað sama, sum tað var í 1996. So er spurningurin, um tað er rætt at spara í fíggjarmálaráðnum. Avleiðingin verður, at nakrar uppgávur, sum vit arbeiða við, koma at taka longri tíð. Og vit fáa ikki sett fólk ístaðin fyri eitt sum fer í summar. Men mín vón er, at vit í komandi ári fáa meir pening settan á, so at vit kunnu koma uppaftur á sama starvsfólkatal sum í 1996.

Tað sigur Bárður Nielsen, fíggjarmálaráðharri, sum ikki er samdur við fíggjarnevndini og hennara útspæli til fíggjarlóg. Føroya Landsstýri hevði sunnudagin fund um tær 49 milliónirnar, sum fíggjarnevndin sparir í rakstri.

- Vit sótu á fundi sunnudagin, og gjøgnumgingu tær tillagingar, sum fíggjarnevndin er komin við. Og har eru nøkur ting, sum tey ymsu ráðini illa kunnu liva við. Men nú fáa vit at síggja, hvussu árið fer at ganga, sigur Bárður Nielsen, fíggjarmálaráðharri.

- Útsagnirnar, sum er komnar úr fíggjarheiminum seinastu vikuna, benda á, at rentan fer at hækka. Men tað hevur fíggjarnevndin so ikki mett, og tað er teirra meting. Tað eru vit so ikki samdir í, men um hetta er tað, sum fíggjarnevndin sigur, so er tað teirra meting. Og kunnu vit ikki liva við tí, so verður neyðugt við eykajáttan, sigur fíggjarmálaráðharrin.



*Vit sótu á fundi sunnudagin, og gjøgnumgingu tær tillagingar, sum fíggjarnevndin er komin við. Og har eru nøkur ting, sum tey ymsu ráðini illa kunnu liva við. Men nú fáa vit at síggja, hvussu árið fer at ganga. Tað sigur Bárður Nielsen, fíggjarmálaráðharri, um tillagingarnar, sum ein samd fíggjarnevnd hevur gjørt við Anfinni Kallsberg sum formanni*

Nettosparingin í rentuútreiðslunum er fýra milliónir krónur, og hetta er ein meting hjá fíggjarnevndini, sum er bygd á forsøgnir um rentuna. Men skuldi tað hent seg, at metingin hjá fíggjarnevndini er skeiv, og at rentan fer at hækka seinni í ár, so fara rentuútreiðslurnar hjá fíggjarmálaráðnum at hækka. Og hetta er ein lógarbundin játtan, og rentustuðulin skal gjaldast av fíggjarmálaráðnum og teirra konto, sjálvt um játtanin er ov lítil. Tað merkir við øðrum orðum, at eitt undirskot er á veg, um rentan hækkar.

- Vísir tað seg so, at rentan fer at hækka í ár, sum alt bendir á og sum vit eisini meta við støði í útsagnum frá amerikanska tjóðbankanum, har teir týsdagin søgdu, at rentan helst hækkar í juli-ársfjórðinginum, so hækkar rentan uttan iva eisini hjá okkum. Og tað meta vit ikki er ráð til, aftan á at fíggjarnevndin hevur skorið í útreiðslunum hjá fíggjarmálaráðnum. Tí-skil verður neyðugt við eini eykajáttan seinni í ár, sigur Bárður Nielsen, fíggjarmálaráðharri, um tillagingarnar, sum ein samd fíggjarnevnd hevur gjørt við Anfinni Kallsberg sum formanni.

# Andstøðan fingið sítt

**Formaðurin í fíggjarnevndini, Anfinn Kallsberg, váttar, at andstøðuflokkarnir í fíggjarnevndini hava fingið ávís mál ígjøgnum fyri at taka undir við broytingaruppskotinum. Hann vil kortini ikki siga, hvørji øki talan er um**

FÍGGJARNEVNDARVIÐGERÐ
*Páll Holm Johannesen, pall@sosialurin.fo*

Ein samd fíggjarnevnd kundi hósdagin boða frá, at fíggjarlógarviðgerðin í fíggjarnevndini er av. Fíggjarnevndin mælir til at skerja fíggjarlógaruppskotið hjá Bárða Nielsen við góðum 94 mio. krónum.

Bæði samgongu- og andstøðulimir í fíggjarnevndini taka undir við tilmælinum. Anfinn Kallsberg er formaður í fíggjarnevndini, og hann greiðir frá, andstøðuflokkarnir hava sett síni fingramerki í tilmælið hjá fíggjarnevndini.

-Andstøðulimirnar hava sæð, at tað er skilabetri av teimum at vera við í viðgerðini. Fyri tað hava teir fingið nøkur økið raðfest hægri, og úrslitið er, at tað er ein samd nevnd, sum er liðug at viðgera fíggjarlógaruppskotið, sigur Anfinn Kallsberg.

Spurdur um hvørji økið, andstøðuflokkarnir hava ávirka, svarar formaðurin í fíggjarnevndini, at tað ynskir hann ikki at viðmerkja.

## Landsstýrismenn innkallaðir

Landsstýrið hevur dúgliga fundast um vikuskiftið. Sum skilst ilskast fleiri landsstýrismenn um tilmælið hjá fíggjarnevndini.

Anfinn Kallsberg sigur, at fleiri landsstýrismenn hava givið til kennar, at teir ikki kunnu taka undir við tilmælunum hjá fíggjarnevndini.

Spurdur um landsstýrismenninir hava verið við í fíggjarlógarviðgerðini hjá fíggjarnevndini, svarar Anfinn Kallsberg, at allir landsstýrismenn hava verið innkallaðir á fund í fíggjarnevndini, men fleiri teirra tóku ikki undir tilmælinum hjá nevndini.

**Broytingar hjá fíggjarnevndini**

| | | Rakstraætlan Úreiðslur | Rakstraætlan Inntøkur | Løguætlan |
|---|---|---|---|---|
| § 1 | Løgtingið | -300 | - | -1.500 |
| | 10. Løgtingið | -300 | - | -1.500 |
| § 2 | Løgmansfyristiting v.m. | -500 | - | 1.000 |
| | 11. Felagsútreiðslur | -500 | - | 1.000 |
| § 3 | Fíggjarmál o.a. | -7.926 | -1.926 | - |
| | 11. Felagsútreiðslur | -500 | - | - |
| | 18. Almenn starvsfólk v.m. | -1.000 | - | - |
| | 21. Almannamál | -500 | - | - |
| | 22. Íbúðarmál | -5.926 | -1.926 | - |
| § 5 | Fiskivinna | -8.800 | 1.500 | -800 |
| | 11. Felagsútreiðslur | -1.800 | - | -800 |
| | 34. Fiskivinna | -6.000 | 1.500 | - |
| | 35. Sjóvinna | -1.000 | - | - |
| § 6 | Vinnumál | -3.800 | - | 2.895 |
| | 11. Felagsútreiðslur | -1.000 | - | - |
| | 32. Ráevnisvinna | -1.000 | - | - |
| | 33. Landbúnaður | -300 | - | - |
| | 36. Aling | -500 | - | - |
| | 37. Handil og vinna annars | -2.900 | - | - |
| | 38. Samferðsla og samskifti | 2.700 | - | 2.895 |
| | 39. Arbeiðsmarknaður | -800 | - | - |
| § 7 | Útbúgving og gransking | -6.907 | - | -6.600 |
| | 11. Felagsútreiðslur | 750 | - | - |
| | 23. Útbúgving og gransking | -7.250 | - | -1.000 |
| | 24. Mentan | -407 | - | -5.600 |
| § 8 | Almanna- og heilsumál o.a. | -19.207 | - | -2.000 |
| | 11. Felagsútreiðslur | -957 | - | - |
| | 20. Heilsumál | -7.500 | - | - |
| | 21. Almannamál | -10.750 | - | -2.000 |
| § 15 | Innlendismál | -2.000 | - | - |
| | 11. Felagsútreiðslur | -2.000 | - | - |
| Tilsamans | | -49.440 | -426 | -7.005 |
| § 20 | Inntøkur | - | 38.000 | - |
| | 52. Skattir og avgjøld | - | 38.000 | - |
| Tilsamans | | -49.440 | 37.574 | -7.005 |

| | Úreiðslur | Inntøkur | Yvirskot |
|---|---|---|---|
| Rakstrar-, løgu- og útlánsætlan RLÚ | -56.440 | 37.579 | 94.019 |



# Skulu bora ein tunnil afturat í Norðoyggjum




*Tær brotnu linjurnar vísa tunlarnir í Borðoynni. Tann óbrotna linjan vísir áleið har, sum fíggjarnevndin vil hava tann nýggja tunnilin, beinleiðis úr Klaksvík heilt til Norðdepil*

**Tunlarnir á Borðoynni eru ikki tíðarhóskandi longur og tí er ætlanin at gera nýggjan tunnil beinleiðis úr Klaksvík, heilt til Norðdepil**

TUNNILSGERÐ
*Áki Bertholdsen, aki@sosialurin.fo*

Nú skal ein tunnil afturat borast í Borðoynni.

Tað ætlar fíggjarnevndin hjá Løgtinginum.

Ein samd fíggjarnevnd mælir tí til, at farið verður beinanvegin undir at gera forkanningar til ein tunnil Norð um Fjall á Borðoynni, sum tað eitur.

Nú fíggjarnevndin hevur skrivað álit um fíggjarlógina fyri í ár, skjýtur ein samd fíggjarnevnd upp at seta 500.000 krónur av til at gera forkanningar til ein tunnil Norð um Fjall á Borðoynni.

Eftir ætlan skal hesin tunnilin ganga beinleiðis úr Klaksvík, heilt til Norðdepil.

## Ikki tíðarhóskandi

Karsten Hansen, sum er limur í fíggjarnevndini, sigur, at tunlarnir, sum ganga úr Ánunum til Árnafjarðar og víðari úr Árnafirði til Norðtoftir eru ikki tíðarhóskandi longur.

– Teir eru einsporaðir og hartil ov lágir til bilarnar nú á døgum. Tað ger, at tað mangan er ruðulleiki í hesum báðum tunlunum og at tað mangan tekur rættiliga langa tíð at komna igjønum teir.

– Serliga góðar summardagar, tá ið nógvir bilar koyra, er tað ruðuleiki í tunlunum.

Harafturat eru tað nógvir bussar og stórir lastbilar, sum als ikki kunnu koyra ígjøgnum teir, tí teir eru so lágir, at tað krevst serbygdir bilar, sum eru lækkaðir, fyri at ganga ígjøgnum tunnilin.

– Sum er, koma stórir bussar als ikki til Norðoyar, tí teir steðga í Leirvík og lata síðani ferðafólki fara til Norðoyggjar.

Karsten Hansen sigur, at hetta er til stóran ampa fyri vinnulív, ferðavinnu og fyri fólk annars.

Hann vísur eisini á ætlanin at gera tunnil undir Leirvíksfirði.

– Skulu vit meta eftir Vágatunlinum, fer tunnilin undir Leirvíksfirði at føra rættiliga nógva ferðslu við sær.

– Tá ið Vágatunnilin varð gjørdur, førdi tað til eitt rættiligt ferðslulop vestur í Vágar og tað er tað sama væntandi, tá ið Norðoyatunnilin verður tikin í nýtslu um tvey ár, sigur hann.

Harafturat eru Norðoyggjar, og serstakliga Viðareiði, sera væl dámd ferðamál, so tá ið undirsjóvartunnilin er komin, er væntandi, at rættiliga nógv ferðsla verður í Norðoyggjar.

## Ruðuleikin fullkomin

– Tá ið Norðoyatunnilin er liðugur, fer tað yvirhøvur ikki at bera til at hava tunlarnar, sum nú eru,sigur Karsten Hansen.

– Er ruðuleikin stórur viðhvørt longu nú, so verður hann fullkomin, tá ið Norðoyatunnilin er komin, sigur Karsten Hansen.

Hann sigur, at tí er Fíggjarnevndin samd um, at tað er rætt at gera nýggjan tunnin, sum lýkur dagsins krøv, ímillum Klaksvík og Norðdepil.

Tunnlarnir til Árnafjarðar og til Norðtoftir verða so, sum teir eru.

Karsten Hansen sigur, at sostatt mælir ein samd fíggjarnevnd til, at gera forkanningarnar nú til ein tunnil beinleiðis úr Klaksvík til Nordepil, so at farast kann undir arbeiðið beinanvegin.

– Hesin tunnilin stóð eisini á langtíðar- útbyggingarætlanini hjá undanfarnu samgongu. Men nú vil fíggjarnevndin hava hetta arbeiðið framskundað, so at farast kann undir tunnilin sum skjótast.

Forkanningarnar skulu vísa, hvar linjuføringin skal vera og, hvat ein slíkur tunnil fer at kosta, men so er eisini ætlanin at fara undir arbeiðið beinanvegin, sigur Karsten Hansen.

Hetta verður ein rættiliga langur tunnil. Ein leyðslig máting vísur, at hann verður ímillum tríggjar og fýra kilometrar langur.

# Kvinnur takka Jenisi av Rana

**Jenis av Rana hevur enn einaferð tikið spurningin um nektardans upp í Løgtinginum og tað takkar Kvinnufelagasamskipan Føroya honum fyri**

NEKTARDANSUR
*Áki Bertholdsen, aki@sosialurin.fo*

Kvinnufelagasamskipan Føroya takkar nú alment Jenisi av Rana, løgtingsmanni, fyri at hann enn einaferð hevur tikið spurningin um nektardans í Føroyum upp í Løgtinginum.

Felagið hevði ársfund í Vági Dýrabiðidag og á tí fundinum varð einmælt smtykt at takka løgtingsmanninum

Í eini yvirlýsing frá fundinum, vísir Kvinnufelagasamskipan Føroya á, at
í hinum norðurlondum verður stríðst fyri at steðga skøkjulevnaði, handli við kvinnum og við at steðga pornografi eisini á alnetinum.

Samsundis vísir felagið á at royndir úr Íslandi prógva at striptease endar í skøkjulevnaði.

– Hetta er ikki góð fyrimynd hvørki fyri okkara ungu ella nakran annan, tvørtur ímóti halda vit tað verða sera niðrandi fyri kvinnur, sigur felagið

Kvinnufelagasamskipan Føroya heitir tí á løgting og landsstýri um at skipa so fyri, at eingin ivi skal verða um at striptease er bannað í Føroyum.